KOMMUNUVALIÐ



tí, áðrenn vanlig arbeiðstíð er liðug, sigur hann.

Ein partur av, at eldrarøktin er flutt til kommununurnar er, at alt er nærri og avvarðadni kunnu fara beinleiðis til tey fólkavaldu í økinum, um tey eru ónøgd við tænastuna.

Krevur nógv

Eldraøkið hevur fingið stóran lut í valsstríðnum – kanska serliga í Tórshavnar kommunu.

Tjóðveldi gjørt í síni valskrá vart við, at flokkurin vil hava fleiri hendur at taka sær av okkara eldru og vil játta 10 milljónir krónur omaná tað, sum verður avsettt í fíggjarætlanini til eldrarøktina.

Á veljarafundi, sum Reinsaríið og Miðlahúsið skipaður fyri leygarkvøldið, lovaðu so at siga øll valevnini, sum høvdu orðið, at eldrarøktin skal uppraðfestast í mun til tað sum hon er í dag.

Og sjálvt um kommununurnar ikki halda, at landið eftir tí avtalu sum er gjørd endurrindar kommununum fyri eldrarøktina, so hava kommununurnar fingið fleiri pengar at arbeiða við.

Tað eru sløk tvey ár farin síðani kommununurnar yvirtóku eldraøkið, so enn síggjast ikki so nógvar nýggjar loysnir, men í flestu samstørvum hava tey ætlanir um at umleggja ein part av eldrarøktini, so hon gerst meira liðilig og peningurin verður brúktur meira skynsamt.

Tað er ein partur av teimum avbjóðingum, sum nývaldu kommunustýrislimirnir standa fyri, tá ið tey taka sæti í býráðunum 1. januar næsta ár.



allar kommunur eru heilt nøgdar við fíggingina. Tá ið samráðignanar vóru í gongd var tosað um, at hetta kanska kundi takast uppaftur, men enn er tað ikki gjørt.

Lógin sigur, at alt skal endurskoðast, men enn er ov stutt fráliðið.

Eldraøkið verður grundleggjandi goldið við forskattingini av pensjónum, men av tí, at nógv ikki noyddust at gjalda eitt prosent inn í ár, tí tað í staðin fór í Samhaldsfast, so hevði hetta eisini við sær, at kommununurnar, hava fingið eitt sindur færri krónur inn.

Soleiðis setir tú krossin í morgin

Í morgin er val til kommunustýrini í Føroyum. Her er ein vegleiðing, so til ber at síggja hvussu atkvøðast skal, tá ið ein stendur inni í valhølinum.

Tað kemur fyri, at veljarar seta annað frámerki á atkvøðuseðilin enn ein kross og hesir atkvøðuseðlar eru í vanda fyri at verða ógildir.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu krossurin skal setast og hvussu hann ikki skal setast,

§ 13, stk. 3 í kommunuvallógini ásetur, at *"veljarin setir kross annaðhvørt fyri tí lista, hann ætlar at velja, ella fyri einum av valevnunum á hesum sama lista".*

Kommunuvallógin sigur eisini í § 15, stk. 5, at ein atkvøðuseðil er ógildur:

- *um* tað ikki við vissu sæst, hvønn valevnislista veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
- *um* atkvøðuseðilin er øðrvísi vorðin enn teir, sum útflýggjaðir eru til atkvøðugreiðsluna,
- *um* á atkvøðuseðilin er skrivað annað enn ein krossur ella valevnisnavn, ella um atkvøðuseðlinum við vilja er givið slíkt eyðkenni, at tað sæst, hvør veljarin er.

Kelda: Innlendismálaráðið

Soleiðis atkvøður tú

